# FM-vónin brast

**VODAFONEDEILDIN**

**Hóast NSÍ hevði bóltin nógv, hevði B36 meira brodd í álopsspælinum, og tað gjørdist avgerandi munurin, tá avtornaði. Samstundis sum sigurin fyri B36 merkti, at ein lítil europeisk vón livir enn, hvarv seinasti møguleikin hjá NSÍ at vinna meistaraheitið**

Hilmar Jan Hansen

| | |
|---|---|
| B36 | 2 |
| NSÍ | 1 |

Tað, sum tey flestu nokk fara at minnast dystin í Gundadali í gjár fyri, mundi vera 1-0 málið hjá B36, sum Hjalgrím Elttør skjeyt miðskeiðis í fyrra hálvleiki Hetta var eitt framúrskarandi langskot, ið brast undir yvirliggjaran, niður í vøllin og upp undir nettakið, uttan at NSÍ-málverjin, Andras Gango, hevði nakran livandi møguleika, hóast hann toygdi seg í fullari longd.

– Eg má viðganga, at eg rakti bóltin øgiliga væl, akkurát sum eg bara kundi ynskt mær. Men bara hatta lítla sekundið fór eg at ivast, um tað bleiv mál, tí eg sá væl, at bólturin skrúvaði burtur frá Gango, samstundis sum tað sá út til, at hann bara skuldi bresta í yvirliggjaran. Men tíbetur fór hann inn, og tað var ein ótrúliga góð kensla, greiðir málskjúttin sjálvur frá málinum, ið onkur segði vera tað besta í Gundadali í ár. Og tað kann saktans passa, tí tað var veruliga ein perla.

Akkurát, tá málið kom, var tað ikki meira enn so, at B36 hevði uppiborið at koma framum í dystinum, tí í roynd og veru byrjaði NSÍ betur. Men hóast trýst og meira ella minni leysar royndir, spurdist ov lítið ítøkiligt burturúr, samstundis sum spælið hjá gestunum gjørdist meira sløsut við nógvum skeivum sendingum.

Í staðin gjørdist tað alsamt oftari og oftari, at B36 gjørdi um seg í hinum endanum, og tá so hálvleikssteðgurin kom, høvdu boð verið eftir NSÍ meiri enn ta einu ferðina. Serliga nær var tað stutt undan steðginum, tá bólturin fór fram við Gango – men Einar T. Hansen í evstu løtu ofraði seg 100 prosent, tveitti seg niður og fekk sparkað burtur av sjálvari málstrikuni!



**KANÓNFRØI**

*Klæmint Matras, Christian Restorff Mouritsen og Jónas Þór Næs hálsfevna Hjalgrím Elttør eftir perlumálið, hann skjeyt, tá hann legði B36 á odda 1-0 ímóti NSÍ*

Mynd: Hilmar Jan Hansen

## Eg má viðganga, at eg rakti bóltin øgiliga væl, akkurát sum eg bara kundi ynskt mær

HJALGRÍM ELTTØR

### Hvør sítt aftrat

Eftir steðgin vístu báðir partar í góða løtu betri spæl enn í fyrra hálvleiki, og álopini bylgjaðu fyrstu løtuna aftur og fram. Tá so góðir tíggju minuttir vóru farnir, fekk NSÍ javnað. Jann Martin Mortensen fekk prikað bóltin til Klæmint A. Olsen, ið royndi seg við skoti, sum B36-málverjin, Magnus Poulsen, fekk skavað bóltin til sín og royndi at skjóta eina ferð aftrat, og hóast Jónas Þór Næs í einari evstu roynd kýtti seg, fekk hann ikki steðgað bóltinum, sum fór í málið.

Rundan um málið hevði NSÍ nokk so stórt trýst og góðar royndir, sum tó ikki góvu nakað – mest, tí tær flestu als ikki raktu málið. So við og við dovnaði trýstið frá gestunum, og í staðin sluppu teir í B36 aftur framat, og fleiri ferðir mátti Andras Gango vísa síni góðu kynstur fyri at halda málið reint.

Tá so sjey minuttir vóru eftir, gav tað mál, tá Jóhan Troest Davidsen var óheppin og kom at standa fyri skoti frá Hjalgrími Elttør. Bólturin bar við hondina, og so kundi B36-liðformaðurin, Klæmint Matras, við einum hørðum brotssparki mitt í málið staðfesta sigurin hjá heimaliðnum.

Síðsta stóra møguleikan í dystinum fekk annars hin Klæmint, tann hjá NSÍ, tá hann eftir eitt fríspark koma at standa leysur mitt fyri málinum, men onkursvegna sendi bóltin upp um mestsum opna málið...

### Ov lítið burturúr

Kanska hetta seinasta var eyðkennandi fyri síðsta triðingin av landskappingini hjá NSÍ, har millum lítið og einki hevur borið til. Kortini hevur NSÍ verið tað liðið av øllum, sum longst hevur verið á odda hetta kappingarárið. Men av teimum síðstu níggju dystunum hava runavíkingar bara vunnið ein, og tí var tað ikki dysturin í gjár, ið kostaði føroyameistaraheitið, ið NSÍ nú ikki longur kann røkka.

– Nei, tað sigur seg sjálvt, at tá so lítið fæst burtur úr so nógvum dystum, kanst tú ikki rokna við at gerast meistari. Sjálvandi var tað súrt at tapa fyri B36, men tað eru so nógvir aðrir dystir, ið kundu havt givið okkum neyðugu stiginí, so vit framvegis vóru við í FM-stríðnum, staðfestir NSÍ-miðvallarin, Jann Ingi Petersen.

– Eftir vánaligu byrjanina upp á kappingarárið høvdu vit helst verið nøgdir við núverandi støðuna, men sum árið hevur lagað seg, kunnu vit allíkavæl ikki vera nøgdir. Eitt skifti vóru vit enntá sjey stig á odda, so samanumtikið er hetta skuffandi. Nú mugu vit bara syrgja fyri at vinna síðsta dystin ímóti B71, so vit – hóast alt – kunnu fáa bronsuna og eitt atgongumerki til Europa næsta ár.

### Seinir í gongd

B36 hevur hinvegin havt eitt kappingarár, sum fyri tað nógva hevur verið í lægra endanum, men nú ímóti endanum er blivið heilt øðrvísi. Síðstu dystirnar hevur B36 fingið nógv burturúr – 13 stig av 15 møguligum í síðstu fimm dystunum – men spurningurin er, hvussu langt tað røkkur.

– Hesa ferð haldi eg, at vit kundu spæla meira frítt, tí nógv størri trýst lá á NSÍ. Tað gav okkum so eisini møguleikan at halda fast við góðu gongdina, sum hevur verið í síðstuni. Og hóast tríggir av okkum hava verið upptiknir av landsliðnum og restin hevur verið niðri í Qatar, so fingu vit aftur hesa ferð víst, at vit veruliga hava fótað okkum ímóti endanum, sigur Hjalgrím Elttør.

– Tíverri er tað kanska í seinna lagi, at vit eru komnir í gongd, men vit trúgva upp á tað til tað síðsta, so vit eru øgiliga spentir til dystin ímóti HB leygardagin. Enn hava vit ein lítlan møguleika fyri at koma út í Europa næsta ár, so vit fara at spæla fyri okkara møguleika, sjálvt um vit vita, at onnur úrslit so eisini mugu laga seg.

*hilmarjan@sosialurin.fo*